Samhaldsfesti og fyrigeving

Niðanfyri prenta vit røðu, sum Hans Jørgensen helt í samband við nýggjárshaldið í Miðvági í ár

Tað er mær ein stórur heiður at standa her frammanfyri bygdarfólki mínum og øðrum, sum have leitað sær higar hesa søguligu løtu. Á henda hátt kann eg ynskja tykkum øllum eitt gott nýggjár og alt gott í komandi tíð. Vit hava øll grund til at takka hvørjum øðrum hesa løtu, tí óansæð, hvussu ósamd onkur okkara kanska hava verið, so eiga vit altíð at líta aftureftir við tí positiva sinnalagnum, og tá finna vit avgjørt okkurt at takka fyri.

Júst hetta at kunna ynskja hvørjum øðrum alt gott, at kunna takka hvørjum øðrum, at fyrigeva hvørjum øðrum, eru vit uppald til í okkara mentan.

Kolveltingarmaður í 2000 ár

Fyri júst 2000 árum síðan føddist í Miðeystri eitt barn, sum fullkomiliga broytti alla mannahugsan. Barnið gjørdist heimsins týdningarmesti kollveltingarmaður. Lógin, strangleikin, hevndin, fordømingin, mannahatrið, klandrið og kríggini vórðu sópað av borðinum gjøgnum hansara boðskap. Tað sum fyrr var bygt á fordøming, hevnd, revsing o.s.fr. varð skift til kærleika, fyrigeving, virðing fyri medmenniskjanum, samhaldsfesti og samanhaldi heldur enn sundurlyndi og klandur.

Sjálvur fell hann fyri gomlu læruni, har revsing, mannahatur og harðskapur var mentanin.

Men læra hansara fór um allan heim og er høvuðsgrundarlagið undir mentan okkara, ja, næstan alla ta tíð, føroyska tjóðin hevur verið til.

Føroyar 1000 ár

Vit hátíðarhalda ikki bara almennu tíðarrokningina, 2000 ár eftir kristi føðning, men eisini kristningina av føroyingum fyri 1000 árum síðan.

Vit eru ótrúliga smálig

Vit vita, at í botn og grund eru vit menniskju ótrúliga smálig og intolerant. Tað er trupult hjá okkum at góðtaka hugsanina og góðu argumentini hjá øðrum. Vit kunnu tíverri eisini ásanna, at vit menniskju hava alt ov lætt við at misbrúka tað góða til at skapa okkum sjálvum makt, og so leggja vit sektin á, hvør líður undir maktgyrnd okkara. Soleiðis vóru eisini tey sokallaðu kristnu eftir Jesu tíð, bæði tann maktmikla katólska kirkjan, okkara lutherska kirkja og aðrar fraktiónir av kristindóminum. Tá hesi funnu útav, at kristindómurin hevði tak á fólkinum, so misbrúktu tey kristnu læruna til at vinna sær sjálvum makt og gloymdu boðskapin um frið á jørð, næstrakærleika, fyrigeving, mildni.

Maktgirndin

Forfedrar okkara fingu svørðið fyri bringuna, tá teir ikki góðviljaðir lótu seg doypa. Gleðiboðskapurin var ikki høvuðsmálið, men hvør,ið hevði maktina.

Soleiðis vórðu fólk eisini forfylgd, pínd og dripin, sum ikki fylgdu „kristnu“ makthavarunum í miðøldini, og soleiðis hevur mannaættin upplivað eina forfylging fyri og aðra eftir, upplivað kríggj og aðrar ræðuleikar í Jesu navni.

Ja, enn í dag uppliva vit, at sjálvt her hjá okkum fara maktgirndarmenn fram við ótespiligheitum og forfylgingum av øðrvísi hugsandi við bíbliuni í hond. Hetta er ókristiligt so tað munar.

Høvdu Jesus við sær

Tað, sum vit vita um gamla føroyska samfelagið og Gudstrúnna - Jesu evangelium -, er ein innilig, markleys trúgv og álit á Gud. Teir gomlu høvdu Jesus við sær, hvar teir enn ferðaðust - á útróðri, í haganum, í bjørgunum - ja, allastaðni.

Um teir altíð vóru so solidariskir, sum Jesus vil, um teir altíð settu seg í næstans stað og góðu honum annað, enn tað, sum fell av ríkamansborði, er ivasamt. Egoisman, sjálvsrættvísin, og maktgirndin eyðkendi væl eisini gamla føroyingin, eins og tað í alt ov stóran mun eyðkennir okkum, sum her eru í nátt.

Seinastu hálvthundrað árini

Vit, sum hava búleikast her tey seinastu hálvthundrað árini, eru óivað tey, sum upplivdu størstu broytingarnar.

Vit vuksu upp í einum spennandi kristnum umhvørvi. Kríggið var av og fólk fóru at taka til sín teir møguleikar, sum eftirkrígstíðin bjóðaði. Vit vóru við í skiftinum frá luxlampuni, primussinum, torvkomfýrinum til el-lampurnar, elkomfýrarnar, miðstøðuhitan o.s.fr.

Fiskimannakonurnar

Fiskimannakonurnar stýrdu tá einsamallar við hús. Tær høvdu børnini við sær á heiðina at røkta torvið, í bøin at bjarga hoynum, í veltuna at seta niður og taka upp epli. Tú hevði eisini sum barn ábyrgd av kríatúrunum saman við mammu tíni. Kúgvin skuldi hava hoyggj og vatn hvønn dag, hon skuldi mjólkast, og sópast skuldi eisini. Hønurnar skuldu ambætast o.s.fr.

Bar framtíðina

Føroyska kvinnan bar í grundini framtíðina inn í samfelagið, sum kenna í dag. Hon hevði ikki fyri neyðini at berjast fyri virðing. Hon bar sína ábyrgd við brattari bringu og rættum høvdi, tí uttan hana bar ikki til.

Kvinnan nýggjar avbjóðingar

Nýggja samfelagið gav kvinnuni nýggjar avbjóðingar. Nú var ikki nóg mikið fyri hana heima við hús. Samfelagið hevði ikki longur somu virðing fyri tí „heimagangandi“ konuni, nei, nú skuldi hon út á arbeiðsmarknaðin at gera nyttuna. Og nú var tað, at kvinnan varð noydd at berjast fyri javnstøðu og uppibornari virðing millum manna. Tað var ikki longur nógmikið, at maðurin vann peningin til húsarhaldið, nei, konan skuldi eisini bera sín part.

Kappdubbingin

Kappingin millum stórveldini eftir kríggið legði ikki minst grundarlagið undir ta veldigu broyting, sum ber okkum inn í nýggju øldina. Fyrsti **sputningurin** varð sendur út í rúmdina. Fyri at rúmdarmenningin og kappdubbingin kundi halda fram, og fyri at stórveldini alla tíðina skuldu kunna prógva vald sítt yvirfyri hvørjum øðrum, so var neyðugt við tøkniligari menning. Hetta bar okkum so fram í telduøldina, sum nú aftur er við at kollvelta allan framburð og alla mentan.

Útbúgving lyklaorðið

Í sekstiárunum komu framhaldsskúlarnir úti um landið. Børnini hjá fiskimanninum, arbeiðsmanninum, bóndanum, einkjuni og einkjumanninum hildu nú fram í skúlanum, tá tey høvdu lokið tvungnu sjeyára skúlagongdina. Tað var minni og minni brúk fyri teimum úti í siðbundnu vinnuni, tí vinnan kravdi meira og meira útbúgvin fólk. Drongurin, sum 14 ára gamal fór til sjós og á tann hátt kundi hjálpa til í húsarhaldinum og vinna sær pening til at seta føtur undir egið borð, gekk nú í skúla, til hann var trøllvaksin. Gentan, sum kanska ofta var meira hugað í skúlanum, enn drongurin, gjørdist nú í mongum fórum stóri kappingarneyti hansara á arbeiðsmarknaðinum.

Atstøði fram um royndir

Vit fingu eitt annað samfelag, har dugnaskapur á skúlabeinki var týdningarmesta kravið, vildi tú fram í lívinum. Framfýsni føroyingurin skuldi ikki longur vera góður fiskimaður, smiðjur, bóndi ella nakað annað traditionelt, nei, skuldi tú vinna fram í verðini, skuldi tú fyrst og fremst vera góður í skúlanum.

Eru farin ov langt

Eg haldi, at vit eru farin nakað langt. Tað kann ikki vera rætt, at ein raskur virkisfúsur føroyingur, genta ella drongur, skulu missa møguleikan, tí tey í síni tíð ikki løgdu alla orku í at stava væl føroyskt, skilja og tosa danskt og enskt ella týskt, ella ikki vóru so ferm í rokning.

Men støðan er nú tann, at tú sleppur skjótt ikki á sjómansskúla, sjúkrasystraskúla o.s.fr. uttan so, at tú frammanundan hevur gingið minst 12 ár til teoretiska fyrireiking. Fleiri læruplass vilja heldur ikki taka lærlingar, sum ikki hava hildið út at mistrívast í fólkaskúlanum øll tíggju árini.

Alt hetta er fyri mongum okkara púra burturvið. Vit vita av royndum, at so mong av okkara undangongufólkum bæði á landi og sjógvi høvdu sera lítla skúlagongd. Tey vóru stuttsagt ikki motiveræd at ganga í skúla. Hugurin og evnini vístu seg harafturímóti, tá veruligu avbjóðingarnar komu.

Vilt tú fram: ver akademikari

Eg vil fyri alt í verðini ikki vera negativur, men havi kortini hug at rópa varskó, nú samfelagið í so gott sum øllum førum setir útbúgvingina sum einastu fortreyt fyri at fáa virðilig og ábyrgdarfull størv.

Lesa vit lýsingarnar eftir fólki hjá tí almenna, so er treytin, at tú hevur akademiska útbúgving.

Ja, sjálvt nú, tá løgmaður skuldi seta nevnd at royna at menna útoyggjarnar, kravdi hann, at leiðarin skuldi koma úr lærdum háskúla. Væl vita vit, at eingin royndur akademikari søkir slíkt starv, men harafturímóti, onkur, ið ongar praktiskar royndir hevur, tí hann ella hon hevur gingið í varda skúlaumhvørvinum, síðan tey vóru 7 ára gomul.

Hetta eigur at fáa eina vend. Vit mugu aftur fara at virða menniskju eftir, hvat tey evna og ikki eftir onkrum akademiskum frymlum.

Koma ikki heimaftur

Hetta um nýggju krøvini til nútíðarmenniskjað hevur eisini tað við sær, at bygdasamfelagið er í størsta vanda. Ungi miðvingurin, sum fiskimaður, arbeiðsmaður, einkjan o.s.fr. sendu á skúlabonk, kemur ikki aftur í bygdina, tá hansara útbúgving er frá hondini. Tað er ikki her, at brúk er fyri honum. Samfelagið, har akademikarin og viðari útbúni ungdómurin skal fáa sínar avbjóðingar, eru nú í miðstaðarøkinum ella í útlondum.

Vit mugu venda gongdini Henda gongd má og skal broytast. Tað skal aftur fara at vera attraktivt at koma aftur til heimbygdina. Og tað kann fara at vera attraktivt, men tað inniber, at vit øll í felagsskapi gera nakað fyri at venda gongdini.

Sambandið um Vestmannasund

Alt bendir nú á, at fasta sambandið til meginøkið verður veruleiki um stutta tíð. Men vit eiga ikki at gloyma, at harvið „er slottið ikki vunnið“, tvørturímóti kann tað fara at vera fyrsti naglin til líkkistu bygdasamfelagsins, hjá bygd og oyggj okkara. Tað verður upp til okkara at gera av, um sambandið verður til gagns ella ikki.

Avbjóðingin er stór, ja, ómetalig. Bera vit okkum rætt at, so fáa vit væl burturúr og bjarga skeivu gongdini.

Ferðslan báðar vegir

Tað skal vera okkara størsta og altavgerandi mál, at ferðslan gjøgnum undirsjóartunnilin, gongur minst líka nógv vestureftir sum suðureftir.

Vit skulu gera Vágar til eitt liviligt stað, har avoyggjafólk ferðast til, hava tað gott og trívast saman við okkum her.

Vit kunnu bjóða so nógv. Eg veit væl, at so mong halda lítið um mentan og frítíðarvirksemi, men sannleikin er, at hevur tú ikki tilboð av tí slagnum eisini, so liggur økið á deyðastrá.

Avbjóðingin var ongantíð størri, enn hon er júst nú. Tað eru vit, sum her búleikast, okkara ungu, ja, øll oyggin, sum nú má taka hendur saman at byggja land.

Jú, vit halda saman

Komið ikki her við gomlu gremjanini, at miðvingar halda ikki saman. Jú, vist halda miðvingar saman, táið á stendur. Hyggið at kirkjuni, missiónshúsinum, ítróttarøkinum, bygdarhúsinum. Hesi og mong onnur tiltøk eru varðar, sum boða frá góðum felagsskapi og stirili í fólkinum. Fólk hava lagt sera stóra orku í at skapa nakað, uttan at vænta somikið sum eina tøkk afturfyri.

Eisini á vinnuøkinum ganga miðvingar saman. Takið t.d. Snarfrost, og fleiri skip, sum øll bygdin gekk saman um fyri at bjarga fólki arbeiði og trivnað.

Eiga at venda alt til tað góða

Alt tað lítla ella stóra, sum vit hava fingið í vøggugávu, eiga vit at brúka til at gera okkurt gott - at vera positiv - vera við góða orðinum - byggja upp heldur enn at bróta niður. Tað er so lætt at oyðileggja, - spilla út okkara næsta - okkara bygd, okkara oyggj, land okkara. Avbjóðingarnar skulu vit taka positivt.

Treytin er samanhald, samhaldsfesti, vilji at virða okkum sjálvi og medmenniskju okkara, trúgva uppá, at tað framvegis skal vera gott at liva í Vágum - í Miðvági.

Spurningurin er ikki, **hvat kunnu hini gera fyri meg, men hvat kann eg vera við til at gera, fyri at øll skulu kunna hava tað betri.**

Ósjálvsøkin skipa nýggjárshaldið

Sama sinnalagið uppliva vit júst nú. Ósjálvsøkin fólk savnast at gera nýggjárshaldið hugnaligt á hvørjum ári. Tað er nóg illa, at vit vita, hvørji hesi eru, so lítillátin eru tey. **Tey krevja ikki, at bygdin skal gera nakað fyri tey, men tey gera nakað fyri bygdina, fyri trivnaðin hjá okkum øllum.** Men her skal kortini ljóða ein hjartans tøkk til nýggjársnevndina og stóra skaran av hjálparfólki.

Jú, evnini hava vit

Jú, evnini hava vit. Fólkið eiga vit. Latið okkum taka hendur saman og byggja land. Latið okkum í komandi øld fjálga og byggja bygd okkara, oyggj okkara, land okkara. Latið okkum í treysti og áliti til tað, vit fingu í vøggugávu, byggja framtíð okkara.

Fyrigev, at tær skal verða fyrigivið

Vit byrjaðu við at minna á grundarlagið undir hesum hátíðarhaldi, nevniliga kristnu heimsmentanina. Hesin arvur okkara byggir á samhaldsfesti, næstrakærleika, spaklyndi og ikki minst fyrigeving. Latið okkum ikki gloyma ta bønina, Jesus lærdi okkum: - **Fyrigev okkum syndir okkara, so sum vit eisini fyrigeva teimum, sum móti okkum synda.** Latið okkum ikki gloyma, at fyri at **fáa** fyrigeving, so mugu vit eisini sjálvi vera fús at fyrigeva. Altso: vit skulu ikki bara biðja um hetta og hatta, vit skulu fyrst verða búgvin sjálvi at geva.

Og minst til: **Tað er ikki at geva, tá tú væntar tær okkurt afturfyri.** Tá er tað forrætning.

Framvegis eina góða nátt og eitt eydnuberandi nýtt ártúsund fyri bygd okkara, oyggj okkara, land okkara og heim okkara.

Gott nýggjár

Hans Jørgensen, lærari, helt nýggjársrøðu í Miðvági

Lýsingartorgið

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
- ✓ privatar lýsingar
- ✓ í mesta lagi 40 orð
- ✓ bert ein lutur í hvørjari lýsing
- ✓ hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
- ✓ frá fyritøkum og virkjum
- ✓ fleiri enn 40 orð
- ✓ søluvirði oman fyri 20.000 kr.

tó minst 50,- kr. + MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
50,- kr. + MVG hvørja ferð:
- ✓ lýsingar undir teigunum: »Dansur«, »Fundir« og »Matur«
- ✓ Bill. merktar

Akfør

2 FORD ESCORT 1,6 CL
annar bilurin hevur plátur og koyrir væl, hin koyrir og er góður til eykalutir. 4 plíkadekk á felgum og 4 sportfelgur á dekkum fylgja við. Til sølu fyri 7.000 kr.
Tlf. 332844

4 FELGUR
13" felgur við skálum til Ford Sierra, til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 444276

4 PÍKADEKK
á felgum 155/70-R14, lítið brúkt, passa til smáar Ford bilar.
Tlf. 373054

APRILIA RS 50
Árg. 98 til sølu.
Tlf. 282303 eftir kl. 18

ESCORT 1,8 D
st. car. frá Týsklandi, árg. ´92, 110.000 km. Servostýring, nýggjar alufelgur við dekkum, nýggj vetrardekk. Sýnaður í nov. ´99. Sær gott út, kostnaður 68.000 kr.
Tlf. 321718 ella 22351178

BILAR TIL SØLU
Ein Opel Senator við aricondition, aut. gear, sportfelgum og fart piloti. Ein Honda Accord frá 1991, báðir í góðum standi.
Tlf. 284747, 216777 og 456777

CITROËN XANTIA
grønur turbo diesel, vælhildin 4 ára gamal, til sølu.
Tlf. 311688, gerandisdagar er best eftir kl. 18

CIVIC TIL SØLU!!
Honda Civic sedan ´88, silvurgráur, koyrt 153.000 km. til sølu fyri 9.000 kr.
Tlf. 319969 ella + 45 23344627

DAIHATSU CHARADE
Til sølu fyri 2.000 kr. ongar plátur, best egnaður sum eykalutir, kann koyra, nógvir góðir lutir.
Tlf. 283645

EIN DEILIGA FITTUR
Nissan Micra 1,2 XL, til sølu, ljósagráur, frá 1991, sær ótrúliga gott út. Nýsýnaður - ongan x, sera góður í kava. Spildurnýggjar bremsuklossar og stoytdoyvarar.
Tlf. 318183 kl. 18, Eyðvør

DIESEL BILUR
1 ára gamal Citroen Xantia, turbo diesel, 1,9, við skaða. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 441381

DIESEL MOTORUR
til Toyota Corolla árg. ´86, til sølu fyri 5.000 kr. Hevur koyrt 220.000 km. Nýliga høvuðsumvøldur.
Tlf. 213213

EYKALUTIR TIL TOYOTA CAMR
SV70-21 árg. 88-91 hurðar v/f v/a bakrútur síðurútar, startari, drívaksil, topstykki, 1.8 gittar varmaapparat o.a.
Tlf. 455843

EYKALUTIR TIL TOYOTA CARI
ST 171 árg. 88-91. Hurðar v/f v/a h/f bakrútur og síðurútar. El rútavindara startari, drívaksil og tendrin.
Tlf. 455843

FELGUR OG DEKK
4 Volvo sportfelgur-model 240 - tríggjar v-dekkum og eitt píkadekk 165x70x14. Bíliga til sølu.
Tlf. 312363

FORD ESCORT
1,6, árg. ´87, við króki, í góðum standi. Til sølu fyri 10.000 kr. ella eitt boð.
Tlf. 314425

FORD ESCORT 1,6 CL
árg 7/95, er í góðum standi. Fá nærri at vita, um bilin við at ringja
tlf. 283566

FORD ESCORT 1,6 i CLX
aug ´95, koyrt 53.000 km. v/ sóltaki, powerstýring, centrallás, radio v/ cd. spælara. Til sølu fyri 78.000 kr. kontrakt kan yvritakast.
Tlf. 22475528 & 75141812

FORD ESCORT SAVOY
Árg. 89, svartur, 5 gear, sær gott út við píkadekkum, til sølu fyri 12.000 kr.
Tlf. 317865 & 282165

FORD FIESTA
hvitur, árg. ´88, til sølu. Hevur plátur. Prísuppskot 12.000 kr. Gev boð.
Tlf. 312079

FORD FIESTA
Ford Fiesta árg. 89 bíliga til sølu. Koyrir, men kann eisini brúkast til eykalutir.
Tlf. 333354

FORD FIESTA ÁRG. 1987
v/skaða framman. Kann koyra. Einans koyrt 36.000 km.
Tlf. 316005

FORD GRANDA 2,0
árg. ´84, bíliga til sølu sum eykalutir.
Tlf. 312034

OPEL VECTRA ÁRG. 1/97
2.0 i CDX 16 v, 5 hurðar 60.000 km. Við allari eykaútgerð, øll eftirsýn yvirhildin. Hevur alarm, radio, bandspælara, 6 stk. CD Box, 15"alu felgur og eyka vetrardekk á felgum. Til sølu fyri hægsta boð. Jeepur kann møguliga ganga inn í keypið.
Tlf. 219194 & 319194

FORD SIERRA
85-90. Nakað av eykalutum bíliga til sølu.
Tlf. 283645

FORD SIERRA 1,6
Árg ´86. Koyrir væl, men hevur ongar plátur. Sera góður til eykalutir, ella at seta í stand.
Tlf. 374609

FORD SIERRA 2,0 I
árg. ´89 til sølu. Hevur m.a. el-rútar, powerstýring, hita í forrútinum, sportfelgur og 2 hurðar. Bilurin er í sera góðum standi.
Tlf. 375265

GEARKASSI
til Mazda 626, árg. ´83 til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 321207 ella 212207

GERIÐ KVETTIÐ
Knapt 1 ára gamal Mazda 323 selist við sórum avsláttri, kan síggjast hjá P/F Wenzel

HONDA CIVIC 1,5 i
Vetec-E, 5 hurðar, hatch back, árg. ´96, koyrt 50.000 km. Vínreyður metallic. Ymisk eykaútgerð fylgir við. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 333070

HYUNDAI SONATA
1.8 i, árg. ´90, bilurin er gráur sær gott út og er í sera góðum standi, hann hevur powerstýring, alufelgur. Við fylgjur eitt sett av vetrardekkum.
Tlf. 220744

MAZDA 323
árg. ´84, í góðum standi, til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 444125

MAZDA 323, 32 BF
árg.´87, nýsýnaður, til sølu vegna flyting. Prísuppskot 16.000 kr.
Tlf. 441484 eftir kl. 15.

MAZDA BUSSUR
e 2200, 100.000 km. til sølu. Sama slag við høgum taki kann fylgja við sum eykalutir.
Tlf. 216887 ella 316887

MOTORUR TIL SØLU
Toyota 3B motorur í besta standi til sølu passar til Toyota Landcruicer og Dyna. Toppstykkið defekt. 100.000 km.
Tlf. 332025 ella 214025

NISSAN BLUEBIRD
2.0D árg. 1/90 til sølu fyri 80.000 kr.
Tlf. 372800 - 288802

NISSAN CHERRY
Turbo, krevur smærri ábøtur, til sølu fyri 4.500 kr.
Tlf. 217747

OPEL ASCONA
árg.´84, aut.gear, kostnaður 10.000 kr.
Tlf. 282828

OPEL CORSA 1,2
árg. ´89, sýnaður í okt. ´99, í góðum standi, bíliga til sølu.
Tlf. 443091

OPEL KADETT 1,3
Árg. ´87, bíliga til sølu.
Tlf. 442082

STOP STOP
hygg her! Daihatsu Charade 1,0 árg. ´88. Til sølu, prísin kunnu vit tosa um.
Tlf. 321618 eftir kl. 18

SAAB 90
árg. ´86, sær hampuligt út, nógvir nýggjir deilir. Sýnaður í okt. ´99.
Tlf. 313383, Ingi

TIL SØLU
sum eykalutir. Mitsubitzi lancer st.car 1500, árg. ´86. Koyrir, hevur plátur. Prísur 2.800 kr
Tlf. 441100 ella 281044

TIL SØLU
Toyota Corolla árg. nov. 1984 AE/80 5 hurðar, sum eykalutir 3.000 kr.
Tlf. 441446

TIL SØLU
King-Cab, árg. 1985, bíliga til sølu.
Tlf. 282691/317691

TIL SØLU
Baghjulsdæk til veteranmc. sælges for kr. 800 kr. Dækket er aldrig brugt, højprofil og i str. 19x3.50. Passer til bl.a. BSA/TRIUMPH/NORTON og NIMBUS.
Tlf. 319618 (Jan)

TIL SØLU
Vøruvognur koyrir væl og sær gott út.
Tlf. 210207

TIL SØLU
Citroén BX 16 TGS, árg. ´90 við nógvum eykalutum, bíliga til sølu.
Tlf. 333304 ella 213146

TIL SØLU
Mitsubishi Pajeru 2.3 turbo diesel árg. 86. Longra modelli, setur aftan og er í góðum standi. Nýsýnaður og motorurin hevur koyrt 102.000 km. Ein motorur og skermar fylgja við sum eykalutir.
Tlf. 211543

TOYOTA CAMRY 1.8 GL
Árg. 86. Fleiri nýggir deilir. Hevur nýggj heilársdekk. Sportfelgur við dekkum fylgja við 195x60x15.
Tlf. 443311

TOYOTA CARINA II
árg 11/91, el-sóltak, cd-spælara, eyka sett av felgum. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 449259 ella 219259

TOYOTA COROLLA
1,3. Árg. 86 er í góðum standi, bíliga til sølu.
Tlf. 448887

TOYOTA COROLLA 1,6
Árg. 1987, til sølu fyri 20.000 kr.
Tlf. 449360 & 447962 eftir kl. 18

TOYOTA COROLLA 1,6
gráður, frá 2/99, koyrt 4.000 kr. til sølu við stórum avsláttri.
Tlf. 310767 ella 217406

VETRARDEKK TIL SØLU
Nýggj lamell/píkadekk, flest allar støddir, til sølu.
Tlf. 282691 & 317691

VW PASSAT
Árg. 87 í góðum standi, til sølu.
Tlf. 441097 & 282385

YNSKIST
2 (4) dekk, 205/50-16 ella 2 (4) dekk 195/55-16, ynskjast til keyps.
Tlf. 319704 ella 283653

YNSKIST
Er tað nakar, ið hevur rútavindarar v/ veiri til ein Mazda 323 BF, árg. ´86, bíliga at selja mær.
Tlf. 422358 ella 316142

Amboð

TIL SØLU
Ein KEV. hátrýst spulari 140 bar.
Tlf. 361180, eftir kl. 20

Arbeiði

ARBEIÐI SØKIST
24 ára gamal maður, søkir alt fyrifallandi arbeiði, yvir styttri ella longri tíðarskeið.
Tlf. 315861

BILUMVÆLING!
Alt innan bilumvæling, so sum uprætting, lakering, servive og el. Ring og fái eina tíð. Tilboð verða givin.
Auto Tek
Tlf. 221006

FA. HÚSAUMVÆLING: TIMBURARBEIÐI
Alt timburarbeiði verður gjørt.
Tlf. 215214

GOYMSLUFÓLK
Søkt verður eftir goymslufóki, at byrja skjótast gjørligt. Kunnleiki innan el-tól er ein fyrimunur.
Hvítvørutænastan
Tlf. 317786 ella 283868

Barnaútgerð

BRIO BARNAVOGNUR
til sølu, grønur við babylift, í góðum standi, til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 310924

BABYLIFT
við jarnsíðum, góðkend at brúka í bili, sær út sum nýggj, til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 312729

BILBARNASTÓLUR
ynskist, helst ein berbarur (0-1 ár), og ein snugliposi.
Tlf. 311322

TIL SØLU
Bláur vælhildin 1 1/2 ára gamal Simo barnavognur við lift og puslutasku, til sølu fyri 3.000 kr. Keypsprísur umleið 6.000 kr. Sera lítið brúkt barnasong 1 ár, til sølu fyri 600 kr. og ein góðkendur Baby-Bjørn beriseðli til sølu fyri 250 kr.
Tlf. 321213

TIL SØLU
Væl viðfarin babylift og babysittari fyri 400 kr. Pusliborð við kommodu (3 skuffur) og baðikar 600 kr.
Tlf. 374609

TIL SØLU
Pearl grulvigarður (eldri modell) við 6 clamps + 2 bekkarastativ til sølu fyri kr. 900,- tlf: 361040, mobil: 211044, e-mail: hjalt@forum.dk

Barnaansing

GENTA/KONA
søkist at ansa eftir 1/2 ára gomlu Hildur, hálvan dag, skjótast gjørligt.
Tlf. 310306

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir *(set X)*
undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Brævaskifti	❑ Burturm./ funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Matur
❑ Pløgg	❑ Samband	❑ Súkklur
❑ Teldur	❑ Tónleikur	❑ Út- & Sjónvarp
❑ Ymiskt	❑ ……	❑ ……

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12.00. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi

Sent hevur:

Navn: ……

Bústaður: ……

Bygd/býur: ……

Tlf.: ……

»Lýsingartorgið«
Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76,
110 Tórshavn

Til frímerki